# Ivory til Eysturríki

**Komandi dagarnar skulu Eivør Pálsdóttir og hennara tónleikarar spæla á tveimum konsertum í Eysturríki**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Mánadagin settu Eivør Pálsdóttir, Mikael Blak, Brandur Jacobsen og Leivur Thomsen kós móti Eysturríki.

Har skal bólkurin, sum higartil hevur gingið undir navninum Ivory, spæla á tveimum konsertum. Onnur verður á einum jazzfestivali har vesturi í landinum fríggjadagin, meðan hin framførslan verður á kendasta jazzklubbanum í Wien, Miles Smiles, mánadagin.

### Áhugi fyri bólkinum

Ferðin er komin í lag umvegis fyriskiparan av jazzfestivalinum, sum hevur samstarvað við Kristian Blak.

Hesin maðurin hevur hoyrt Ivory spæla í Føroyum og dámdi tað væl. Hann hevur síðani hoyrt upptøkur við bólkinum og var áhugaður at fáa tey til Eysturríkis.

Umframt tær tvær framførslurnar hevur Ivory eisini møguleikan at fáa møguleikan til aðrar konsertir, tí fólk, sum hava áhuga fyri bólkinum, ætla at lurta eftir teimum í Eysturríki

### Nýggjan gittarspælara

Nýggjur gittarspælari er komin upp í bólkin. Tað er útisetin Leivur Thomsen, sum hevur spælt í fleiri ymiskum bólkum gjøgnum árini. Ætlanin er, at bólkurin skal hava nýtt navn í tí sambandi, men enn er ikki greitt, hvussu Eivør og tey fara at rópa seg framyvir.

Hóskvøldið í farnu viku spældu Eivør og tey á cafékvøldi í Føroyingahúsinum í Keypmannahavn, og tað var góð upphitingin til ferðina til Eysturríki.

# Gittarspælari farin úr Týr

**Annar av gittarspælarunum í rockbólkinum Týr er farin úr bólkinum. Enn er ikki greitt, um bólkurin heldur fram við einum gittarspælara ella nýggjur maður skal finnast**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

- Vit mugu tíverri upplýsa, at Jón Joensen er farin burtur úr Týr. Vit hava ikki gjørt av, um vit skulu hava ein nýggjan gittarspælara, ella um vit halda fram við einum gittarspælara.

Soleiðis eru boðini, sum Týr gevur á heimasíðu síni nú um dagarnar. Bólkurin fór fyri góðum trimum vikum síðani í studio í Keypmannahavn, har upptøkur skulu gerast til nýggja fløgu við bólkinum.

Einki verður sagt um, hví Jón Joensen er farin úr bólkinum, men tað verður staðfest, at hann heldur ikki fram.

Bólkurin Týr varð fullmannaður í január mánaði í 2000, men tað er serliga umvegis Prix Føroyar tónleikakappingina, at fólk eru komin at kenna bólkin.

Teir, sum spæla í Týr, eru nú: Pól Arni Holm (sang), Kári Streymoy (trummur), Heri Joensen (gittar) og Gunnar H. Thomsen (bass).

# Føroyskar rockútgávur á veg

**Týr, Chase og 200 arbeiða í hesum døgum við nýggjum fløgum. Chase og 200 ætla at geva fløgu út í ár, meðan útgávan hjá Týr væntandi kemur fyrst í komandi ári**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*



*Tónleikurin til nýggju fløguna við 200 er tikin upp og ljóðblandaður. Ætlanin er, at útgávan skal verða tøk í komandi mánaði*

Tað er líkt til, at føroyski fløgukeyparin sleppur at ogna sær nakrar føroyskar rockfløgur komandi tíðina.

Týr, Chase og 200 arbeiða í hesum døgum við fløgum, og ætlanin er, at tvær av hesum fløgum skulu koma út í ár. Fyrst í komandi ári skal útgávan hjá Týr á marknaðin.

Bólkurin 200 er liðugur við sínar upptøkur í MediaMusic studionum, sum føroyingar reka í Danmark. Tónleikurin á fløguni er eisini ljóðblandaður. Tað varð gjørt í Lundegaard Studio í farnu viku, og bretin David Hyatt stóð fyri hesum arbeiði.

- Vit hava lagt okkum eftir at fáa eitt rátt og hart ljóð, og vit hava spælt ein stóran part av tónleikinum live í studio. Vit hava fingið tað ljóðið burturúr, sum vit ynsktu okkum, sigur Mikael Blak, sum spælir bass í bólkinum 200.

### Prix-sangir við

Á fløguni hjá 200 eru allir sangirnir, sum vóru spældir í Prix Føroyar tónleikakappingini. Harafturat eru sangir, sum ikki hava verið nakað serligt frammi higartil.

Stílurin er fyri tað mesta tann sami, sum bólkurin brúkti í Prixinum. Talan er um frískan og ferðmiklan punkrock.

Tónleikaligi parturin av fløguni er liðugur og klárur at fara í framleiðslu. Nú verður húsin til fløguna gjørdur. Ætlanin er, at fløgan skal koma út í november mánaði.

### Chase í gongd

Chase hava spælt grundina inn á sínum sangum. James Olsen hevur bukað trummurnar upp á pláss, og Mikkjal Joensen er júst liðugur við at spæla bass. Nú skal Niclas Johannesen undir gittarupptøkurnar, og síðani skal Edmund Jacobsen syngja. Harafturat skulu aðrar upptøkur eisini gerast.

Upptøkur eru gjørdar í Keypamannhavn, men nú fer arbeiðið fram undir leiðslu av Niclas Johannesen í JacZac studio í Havn.

### Týr í studio

Týr er komið í gongd við sítt upptøkuarbeiði í Toccata upptøkuhølunum í Keypmannahavn.

Teir hava havt úr at gera seinastu vikurnar við at venja, leggja tónleikin til rættis og at spæla inn. Upptøkurnar byrjaðu 24. september og skulu halda fram næstu tvær vikurnar.

Týr ætlar sær ikki at fáa fløguna út til jólamarknaðin, men hinvegin vónar bólkurin, at tað gongur ikki ov lang tíð í komandi ári, áðrenn fløgan kemur út.

Clickhaze hevur eisini verið í studio í Danmark, har fýra sangir vóru tiknir upp. Enn er ikki greitt, hvat hesar upptøkurnar skulu brúkast til.

# Teitur gera nýggja fløgu

**Í næstum fer Teitur Lassen undir upptøkurnar til nýggja fløgu á føroyskum. Sangirnir vóru skrivaðir, meðan hann var heima í summarfrí**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Teitur Lassen, sum ferðast nógv í útlondum sum tónleikari, ætlar seg í næstum undir upptøkurnar til eina nýggja føroyska poppfløgu.

Fløguna fer hann at kalla Sólin og Regnið, og sangirnir, sum skulu á útgávuna, vórðu skrivaðir, meðan Teitur var heima í summarfrí.

Teitur vil í løtuni ikki siga meira um útgávuna.



*Teitur Lassen var fyri kortum í USA, men fleiri konsertir, sum hann skuldi halda í New York, Boston og Los Angeles vórðu avlýstar orsaka av yvirgangsálopinum*

### Ávirkað av álopum

Teitur Lassen var fyri kortum í USA, men fleiri konsertir hjá honum vórðu avlýstar. Hann skuldi eftir ætlan hava konsertir í New York, Boston og Los Angeles fáar dagar eftir skakandi yvirgangsatsóknina, men alt varð avlýst.

- Alt var sjálvandi sera ávirkað av álopinum. Øll vóru í sjokk, og alt varð reflekterað ígjøgnum hendingarnar, greiðir Teitur frá.

### Hevði tvær konsertir

- Nógvar framførslur á Broadway vórðu eisini avlýstar, tí fólk høvdu ikki hug at fara til sangleikir og annað undirhald í vikuni eftir álopini.

Hóast avlýstu konsertirnar gekk ferðin hjá Teiti í USA nøkunlunda sum ætlað.

Hann var í Los Angeles og í Nashville, og mesta av tíðini fór við at skriva løg og at verða í studio.

Hann hevði eisini tvær konsertir í Nashville.

# ítróttur

Nr. 206 • hósdagur • 25. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fleiri spyrja eftir Jákupi

**Framtíðin hjá føroyska landsliðsmálverjanum verður avgjørd ein av komandi døgunum**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Jákup Mikkelsen hevur nógv at hugsa um í hesum døgum.

Hann veit, at hann mánadagin fer aftur til Danmarkar, har konan og børnini bæði búgva. Hann veit eisini, at hann sunnudagin skal verja Moldemálið í sera týdningarmiklum landskappingardysti á útivølli í Stavanger. Men hann veit ikki, hvar hann skal spæla fótbólt í framtíðini.

Nær roknar tú við, at tann spurningurin verður avgreiddur?

– Eg dugi ikki at siga tað, men eg vóni, at tað verður skjótt. Ætlanin var, at eg skuldi tosa við Moldeleiðsluna mikudagin, men tá lá tað ikki fyri hjá teimum, so fundurin verður hósdagin. Teir hava sagt, at teir skulu koma við einum tilboði um tvey ára sáttmála hósdagin, men eg rokni ikki við, at nakar sáttmáli verður undirskrivaður hósdagin, sigur Jákup Mikkelsen úr Molde.

Hann fer at hava ráðgeva undir liðini, tá hann í dag fer at samráðast við leiðsluna í Molde.

### Stórur áhugi

At Molde hevur gjørt av at bjóða Jákupi tvey ára sáttmála, og at teir í tí sambandinum hava givið til kennar, at teir eru væl nøgdir við tað, sum Jákup hevur avrikað, er rokkið longur enn til norsku og føroysku fjølmiðlarnar.

Síðani hann í summar fór til Noregs, hevur lítið verið at hoyrt og sæð um Jákup í donsku fjølmiðlunum, men hesar seinastu dagarnar er hann aftur vorðin umrøddur.

At danska pressan aftur er farin at vísa Jákupi áhuga hevur havt við sær, at telefonin er farin at ringja hjá føroyska málverjanum í Molde. Vit skilja á lagnum, at fótbóltsumboðsmenn og feløg eru áhugað í málverjanum.

Tí kann tað hugsast, at onnur tilboð koma upp á tal enn tað, sum Molde fer at leggja á borðið í dag, men Jákup við einki siga um hetta, tí hann veit einki. Men tað kann ganga ógvuliga skjótt í fótbóltsheiminum og ikki minst, tá tað snýr seg um at keypa og selja spælarar.



*Í dag skal Jákup Mikkelsen á fund við leiðsluna í Molde. Teir fara at koma við einum uppskoti um tvey ára sáttmála, men Jákup roknar ikki við, at nakar sáttmáli verður undirskrivaður í dag*

### Gott mót

Samstundis sum hann hugsar um, hvussu tað verður við framtíðar arbeiðsplássinum, fyrireika Jákup Mikkelsen og liðfelagarnir seg til síðsta landskappingardystin. Hann verður í Stavanger ímóti Viking, og tað er ein stór uppgáva. Viking hevur tryggjað sær bronsukrónurnar, og teir kunnu ikki røkka meira ella minni.

– At teir ikki hava so nógv at spæla fyri, sum vit hava, ger kanska, at møguleikin hjá okkum verður betri, enn hann hevði verið, um tað hevði verið alneyðugt hjá teimum at vinna.

Men tað gekk einki serligt hjá tykkum sunnudagin?

– Nei, vit taptu 3-0. Tríggir av stuðulsspælarunum vóru leikbannaðir, og vit spældu eitt øðrvísi system, enn vit hava gjørt higartil. Tað var ikki nóg gott. Nú eru leikbannaðu menninir tøkir aftur, og havi ikki so ringt mót undan síðsta dystinum, sigur Jákup Mikkelsen, sum tykist hava rætta sjálvsálitið.

– Hesa síðstu tíðina hevur tað gingið, sum tað eigur at ganga. Eitt skifti kendi eg tað soleiðis, at eg hvørki undir venjing ella í dystinum spældi á støðinum, sum eg visti, at eg átti at megna, men tað havi eg gjørt seinastu tíðina, staðfestir fyrrverandi KÍ-málverjin, sum nú er í Molde, og sum ein av komandi døgunum fer at finna út av, hvar fótbóltsframtíðin hjá honum skal vera.

# Hull gjørdi sjálvmál í yvirtíðini



*Julian Johnsson hevði eina góða roynd, tá Hull spældi javnleik á heimvølli mikukvøldið. Julian spældi allan dystin á miðvøllinum*

**Hóast onkrar útskiftingar, so var Julian Johnsson aftur á miðvøllinum allar 90 minuttirnar**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Tað verður spælt av lívsins kreftum í Onglandi. Týskvøldið hevði Hull City heimavøll ímóti Leyton Orient, sum er á tólvta plássi. Úrslitið var 1-1, og hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at Hull ikki fekk fulla úrtøku á heimavølli. Teir høvdu frammanundan vunnið seks heimadystir á rað.

Hull kom á odda, tá tað restaðu 13 minuttir. Toppskjúttin hjá liðnum, Gary Alexander, sendi við høgra beini í netið, og alt bendi á, at talan var um sigursmálið.

Men eydnan var ikki við Hull.

Í síðstu sekundum í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, gjørdu teir sjálvmál. Leyton Orient álopsmaðurin Steve Watts stútaði á tvørtræið, haðani bólturin fór í miðverjan Justin Whittle og í málið.

Sjálvandi vóru teir í Hull vónbrotnir av, at teir mistu tvey stig í evstu løtu, men bæði heimasíðan hjá Hull og aðrir fjølmiðlar vilja vera við, at út frá dystargongdini var tað í lagi, at gestirnir fingu eitt stig við aftur til hús.

Julian Johnsson var leygardagin skiftur úr í hálvleikinum. Men týskvøldið var hann aftur á miðvøllinum allar 90 minuttirnar. Venjarin hjá Hull, Brian Little, hevði gjørt onkrar broytingar, men hann vísti føroyska miðvallaranum álit. Í fyrra hálvleiki hevði Julian eina góða roynd, sum varð blokerað til horna.

# Ingun og Erland vunnu fyrsta umfar

**Um vikuskiftið var fyrsta umfar av Grand Prix í badminton spælt í Havn**

BADMINTON
*Eyðun Klakstein*

Ung og vaksin kappaðust um vikuskiftið í fyrsta umfari av Grand Prix kappingini í badminton.

Hjá teimum vaksnu vóru tað Erland Poulsen úr HBF og Ingun Hansen úr Stráluni, sum vunnu. Erland Poulsen vann á Ragnar Rasmussen í finaluni, og Ingun Hansen vann á Guri Poulsen.

Hjá gentum 11 ár var Hanna Elisa Óladóttir Arge nummar 1, meðan Sigrið Dalsgarð var nummar 2. Báðar úr HBF.

Hjá gentum 13 ár var Brynhild Carlsson nr. 1 og Óluva Bærentsen nr. 2. Tær eru eisini úr HBF.

Vestmenningar vóru stinnast hjá gentum 15 ár. Ulla í Dávastovu var nr. 1, meðan Rannvá á Rógvi var nr. 2.

Kappingina hjá kvinnuunglingum vann Fríða Næs úr ÍF.

Fríði Lamhauge úr HBF vann kappingina hjá dreingjum 11 ár, meðan Ari Ellingsgaard úr ÍF var nr. 2.

Hjá dreingjum 13 ár vann Flipin Gran úr MBF, og Reidar Luid úr HBF var nr. 2.

Hjá dreingjum 15 ár vann Niclas Eysturoy úr HBF, og Rógvi Poulsen úr HBF var nr. 2

Sverri Ellingsgaard var best hjá mansunglingum, og Gunnar Poulsen úr HBF var nr. 2.